**Røða hjá Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu til - Framløga av kanning: Kyn, javnstøða og javnrættindi: Hvat halda føroyingar? - Ein kanning um hugburð til javnstøðu í Føroyum – 2. mai 2023**

Kyn, javnstøða og javnrættindi - hvat halda føroyingar Hjartaliga vælkomin tit øll til hetta tiltak um javnstøðu. Javnstøða er eitt týdningarmikið mál, og tað er gleðiligt, at tit hava tikið tykkum tíð at savnast um tað í dag. Takk fyri tað. Tað skal vera mítt ynski, og mín vón, at vit í nógv størri mun fara at hugsa og viðgera javnstøðu í øllum málum, og á øllum mótum. Ikki bert tá ið vit tosa ítøkiliga um javnstøðu, men at tilvitanin um javnstøðu sæst aftur í øllum samfelagsviðurskiftum.

Tí javnstøða er partur av fólkaræðinum. Tað at kynini eru javnt umboðað og eru við til at taka avgerðir og mynda samfelagið er avgerandi fyri góða samfelagið. Tað er avgerandi fyri trivnað og menning. Tað vísir, at her liva vit í einum veruligum fólkaræði, og at allar røddir hava týdning og ávirkan. Júst fólkaræðið er í hesum døgum hótt nógvastaðni, lat tað vera okkum ein áminning um ongantíð at taka hvørki fólkaræði ella vunnin rættindi fyri givið. Júst hesa løtu kunnu vit takka fyri talufrælsið og savningarfrælsið. Javnstøðumál er partur av øllum málum, men fyrst og fremst eitt mál um frælsi og ábyrgd.Vit skulu øll hava frælsi at velja sjálvi, men vit eiga eisini øll ábyrgd í at røkja frælsið við skygni og virðing.

Tá ið man spyr foreldur um tey halda, at gentur og dreingir skulu hava somu møguleikar at liva og virka í øllum lutum so siga nokk so gott sum øll ja. Tað sama um man spyr fólk á gøtuni. Tey siga ja. Hendan kanningin, sum nú verður framløgd hevur eisini spurt føroyingar henda spurningin og allarflestu eru samd um, at kvinnur og menn skulu hava somu møguleikar og somu rættindi.

So kunnu vit spyrja okkum sjálvi, hví veruleikin ikki er samsvarandi okkara felags ynski? Hvat er tað sum hendir frá hugsan til veruleika? Tað fær meg at hugsa um samrøðuna millum Peter Plys og Grisling, tá ið Grisling segði við Peter Plys, meðan teir tosaðu, at hatta var ikki serliga klókt sagt. Og Peter Plys svaraði, at tað ljóðaði so klókt í høvdinum á mær, men tað hendi okkurt á veg út! Eg eri eitt sindur har, sum Plys er.

Tað snýr seg um hvat hendir í høvdinum á okkum, um hugburð. * Tað hevur ofta verið umrøtt um vit framvegis skulu hava eina javnstøðulóg, sum hevur málið um javnstøðu millum kvinnur og menn sum aðalmál. Um tíðin ikki er komin til, at vit í staðin hava eina javnrættindalóg, og at vit arbeiða við javnrættindum í breiðasti merking. Svarið er ikki antin ella, men bæði og. Enn tørvar okkum at arbeiða miðvíst við javnstøðu millum kynini.

Men tað frítekur okkum ikki frá at arbeiða við javnrættindum. Tað er eitt áhaldandi arbeiði, sum vit skulu gera. * Seinasta heyst setti táverandi javnstøðunevnd saman við Demokratia og AMMR eina kanning í verk um javnstøðu. Innsavnanin av spurnarkanningini varð gjørd í november.

Síðani hava Heini, Erika og Herit gjørt frágreiðingina, sum var liðug í apríl 2023. (Lógir gjørdi kanningin)

Vit eru glað fyri samstarv við Setrið og vóna, at júst hetta økið verður nakað vit koma at samstarva meira um. Fyri okkum sum arbeiða við javnstøðu, er tað ein avbjóðing, at vit vita ov lítið. Tað er ikki nokk at gita ella at halda, at vit nokk eru sum onnur lond. Vit víkja frá við okkara serstaka samfelag, og tað hevur týdning, at vit vita hvar vit standa, tá vit fara at gera javnstøðupolitiskar ætlanir og/ella dagføra lóggávuna, sum ikki er alt, men ein partur av neyðugum framstigum.

Okkum tørvar meira gransking og neyvari hagtøl um javnstøðu. Tí er arbeiðið á Hagstovuni eisini alneyðugt. Hendan kanningin, sum vit nú fara at fáa innlit í snýr seg í stóran mun um hugburð til javnstøðu. Eisini tað hevur týdning. Tí hvat halda fólk veruliga um javnstøðu? Hava tey eina meining um javnstøðu í politikki, um umboðan í nevndum og ráðum, hvør er hugburðurin til barnaburðarfarloyvi, pensjónir, arbeiðstíð, útbúgving, um hvønn mær sær og hoyrir í miðlunum, um javnstøðu í ítrótti, innan umsorganarøkið, á dagstovnaøkinum ... og soleiðis kundu vit hildið fram.

Skal eg siga fyri meg sjálva, so síggi eg fleiri javnstøðuavbjóðingar í løtuni. Eg skal nevna nakrar. - Kvinnuundirskotið í Føroyum - Talgildingin.75% av størvunum verða knýtt at tøkni komandi árini. Vit mugu hava gentur og kvinnur við, tí tøknin skapar framtíðina. - Pensjón. Lívslønin er

lægri hjá kvinnum - Javnstøða í heilsu - Javnstøða í mun til harðskap - Foreldrajavnstøða - Hvør eigur ognir og valdið í Føroyum - Umsorganarfakini eru lægstlønt, og stórur partur hevur niðursetta arbeiðstíð. Lønarlyft er tí eisini eitt javnstøðumál - Polariserað javnstøðukjak. - At javnstøða verður gjørt til eitt persónligt val fyri einstøku kvinnuna. Tú kanst bara velja. Og at man tá ikki hyggur eftir strukturum sum ávirka. Vit eru ymisk menniskju og vit hava ymisk virði og ymiskar uppfatanir. Tað kemur kanningin eisini at vísa.

Eg fegnist um kanningina og vóni vit fara at brúka hana skilagott til eitt gott og konstruktivt kjak. Javnstøðumál fara at verða raðfest í hesum samgonguskeiðnum. Vit byrjaðu vit at fara til ST í New York á javnstøðuráðstevnu. Vit fara at eftirmeta javnstøðulógina og vit fara at gera eina virkisætlan við ítøkiligum málum, sum fremja javnstøðu. Til hetta tørvar okkum eina breiða viftu av samstarvspørtum. Vit hava eisini júst fingið eina nýggja javnstøðunevnd. Eg vil nýta høvið at ynskja tykkum hjartaliga til lukku,og takk tit sum hava sitið. Eftir er bert at ynskja okkum eitt gott javnstøðukjak.

**Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum**